


*Rúni Djurhuus og Havgrímur Johannesen framman fyri Rex og Deep. Teir samstarva,heldur enn at kappast*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Vóna regn á ólavsøku

## Hjá teimum, ið reka dansistøð í Havn, er ólavsøkan kærkomin, tí fólk eru beint uttanfyri hurðina, men tað ræður eisini um at fáa tey inn

**Dagfinn Olsen**

Rúni Djurhuus og Havgrímur Johannesen reka Rex og Deep í Havn. Teir báðir samstarva, heldur enn at kappast. Í Rex verður roynt at hava ymiskt til tilkomin, meðan tey ungu heldur kunnu leita sær í Deep.

Rúni og Havgrímur siga, at á ólavsøku er fólkið í túninum, og at tað ræður bara um at fáa tey inn. Er veðrið gott, er hetta ikki altíð so lætt, tí tá tíma fólk ikki inn. Hinvegin hjálpir heldur ikki við ódnarveðri, tí tá leita fólk sær als ikki í býin.

### Vóna regn

Skemtandi halda teir fyri, at teir eru helst millum tey fáu, ið vóna regn á ólavsøku.

Hetta er sjálvsagt sagt í skemtiligum tóna, men tað er ikki bara gamansleikur at reka dansistøð.

-Rákið flytist alla tíðina, og fleiri skonkistøð eru úti nú, enn fyrr, sigur Rúni Djurhuus.

Tey eldru sleppa 29.juli at swinga í Rex, tí tá er Hallur Joensen í Rex.

Ímong ár hevur strip-tease verið á ólavsøku, men so verur ikki í ár.

Havgrímur Johannesen sigur, at Deep hevur tað, tey ungu vilja hava, Dj og góðan tónleik, og umframt er hetta nýggjasta høli av sínum slag í landinum, og sjálvt útlendskir plátuvendarar gerast bilsnir av umstøðunum.

Um munin millum vanlig vikuskiftir, og ólavsøku, siga teir báðir, at á ólavsøku verða ofta nógv fleiri atgongumerkir seld. Øll fólkini eru ikki inni samstundis, men reika inn og út, ella summi koma tíðliga og fara avstað aftur.

Teir eru samdir um, at stuttligt er at skipa fyri á ólavsøku, tí nógv fólk eru í býnum, og nógv eru fín og í føroyskum klæðum.

# Løgreglan nógvar liggjandi gestir

## Arbeiðsuppgávurnar hjá løgregluni í Havn eru tær somu á ólavsøku, sum vanlig vikuskiftir

**Dagfinn Olsen**

Hjá løgregluni er munurin á arbeiðsuppgávunum ikki so stórur, hvørt talan er um vanligt vikuskifti, ella ólavsøku.

-Uppgávurnar eru kanska eitt sindur fleiri. Men ikki so nógvar, sum ein kundi hildið, um ein hugsar um, hvussu nógv fólk eru savnað í Havn, sigur Andras Marr Poulsen, syslumaður í Streymoyar syslu.

-Nógv er í samband við, at fólk drekka, men tað er tað jú eisini vanlig vikuskiftir. Ofta siga fólk frá, at fólk eru avdottin og liggja og sova úti. Men tá hevur veðrið nógv at siga. Men vit hava nógvar liggjandi gestir á ólavsøku, men helst vóru teir fleiri fyrr, áðrenn mína tíð, metir Andras Marr Poulsen.

Tað hátíðarliga er ein partur av ólavsøkuni, og vit eru í fínum løgreglubúna, og eru við til skrúðgongur. Men á kvøldi eru vit aftir klødd til tær uppgávur, ið eru at loysa, sigur Andras Marr Poulsen.

Á ólavsøku eru løgreglufólk í Havn á vakt, umframt at hesi fáa styrk frá løgreglufólkum kring landið.

